## Nógv rúsevni og innbrot

Juli mánaður gjørdist tann strævnasti hjá rúsevnadeildini hjá íslendsku løgregluni samanborið við hinar mánaðirnar í ár. Løgreglan fekk ikki færri enn 163 mál um rúsevni í síðsta mánaði. Tað er tó ikki vist, at tað stóra talið sigur nakað um veksandi nýtslu, tí sambært løgregluni er eftirlitið hert munandi, og tað er helst høvuðsorsøkin til tað stóra talið í juli. Tað var nú ikki bara rúsevnið, sum gav løgregluni nógv at hugsa um í juli, tí hendan mánaðin vóru ikki færri enn 262 innbrot.



# Hall hjá Suðuroyar Sparikassi

**Grundraksturin gav eitt úrslit á 2,8 mió kr., men eftir burturleggingar er talan um hall upp á 1,7 mió**

VINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Úrslitið fyri sama tíðarskeið í fjør vísti eitt yvirskot á 2,68 mió. kr.

Afturgongdin skyldast fyri ein stóran part gongdini á altjóða partabrævamarknaðinum og øktum burturleggingum.

Sparikassin hevur eftir varsemisprinsippinum burturlagt t.kr. 2.893 fyrra hálvár 2008.

Kurstapið hjá stovninum er 1,7 mió. kr og avskrivingarnar eru t.kr. 347. Fyri sama tíðarskeið í fjør vóru hesi tøl ávikavist t.kr. -987 í burturleggingum, t.kr. 567 í kursvinningi og t.kr. 343 í avskrivingum.

Burturleggingarnar hava við sær, at Suðuroyar Sparikassi hevur eitt burturleggingar procent á 1,8%. Hetta er væl lægri enn á føroyska fíggjarmarknaðinum annars, har ið burturleggingarprosentið í miðal er 2,7%.



Fíggjarstøða sparikassans javnvigar við 496 mió. kr. ultimo juni 2008 ímóti 435 mió. kr. ultimo juni 2007. Hetta er ein vøkstur uppá 13,8%.

Útlánini eru í dag 95% av innlánum. Av hesum er 13% vinnulán og 87% privatlán, harav eru 65% bústaðarlán.

Samanlagt eru útlánini 416 mió. kr. fyrra hálvár 2008, samanborið við 376 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Innlánini í Suðuroyar Sparikassa eru 442 mió. kr. fyri fyrra hálvár 2008, samanborið við 367 mió. kr. somu tíð í fjør - innlánini øktust sostatt 20,4%.

Eginpeningur sparikassans er t.kr. 42.398. Solvensurin ultimo juni 2008 er 13,4% í mun til 15,3% sama tíðarskeið í fjør - tað er væl omanfyri lógarinnar krav, ið er 8%.

# Betri rakstur – verri úrslit

**Øktar avskrivingar, hækkandi oljuprísir og kursjavningar tyngja raksturin hjá Atlantic Airways, sum tó framvegis hevur svørt tøl á botnlinjuni. Grundraksturin er tó betraður við hálvari fjórðu millión**

VINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Úrslitið hjá Atlantic Airways eftir skatt gjørdist góðar 6 mió. kr. annan ársfjórðing í 2008 samanborið við 17 mió. kr. somu tíð í fjør. Avlopið fyrra hálvár í 2008 var 246.000 kr. samanborið við 12,5 mió. kr. í 2007.

Í fráboðanini til virðisbrævamarknaðin verður sagt, at høgir prísir á brennievni, størri avskrivingar og stór sveiggj á partabrævamarknaðunum hava ávirkað hálvársúrslitið í 2008 munandi samanborið við fyrra hálvár í fjør, ið annars kastaði sjáldsama væl av sær.

Prísurin fyri brennievni á rutuflúgvingini hækkaði fyrra hálvár í ár við 11 mió. kr. sammett við fyrra hálvár í 2007. Hetta tyngdi raksturin nógv. Virðisjavnanin á virðisbrøvum gav 5,0 mió. kr. í vinningi fyrra hálvár í fjør, men fyrra hálvár í 2008 elvdi hon til eitt ett tap á 1,6 mió. kr.

Felagið tók í nýtslu tvey flogfør og eina tyrlu á heysti í fjør, og hetta sæst aftur í avskrivingunum, sum vóru 10 mió. kr. hægri fyrra hálvár í 2008 sammett við sama tíðarskeið í fjør.

- Frároknar tú úrslitið av virðisbrævajavnanini, so neutraliserar hetta munin við á leið 6 milliónum. Avskrivingar skulu sjálvandi roknast við, tí tær eru jú úttrykk fyri endurnýggjanina av flotanum, men hóast oljuprísurin er farin upp ígjøgnum loftið, so hava vit ein grundrakstur, sum sær sera skilagóður út, og tað eru vit sera fegin um, sigur Magni Arge, stjóri, við portalin.

Av roknskapinum sæst eisini, at EBIDA – úrslit fyri avskrivingar og javnanir – er betrað. Hetta tal var fyrra hálvár í ár 35,3 mió kr. Fyrra hálvár í fjør var hetta 31,9 mió kr.

Talið á ferðafólkum við rutuflogførunum fyrra hálvár í ár vaks við 5.170 ferðafólkum úr 92.201 upp í 97.371 ferðafólk. Vaksandi ferðafólkatal og hægri meðalinntøka fyri hvørt ferðafólk høvdu við sær inntøkuvøkstur í rutuflúgvingini, men hesin vøkstur stóð tíverri ikki mát við vøksturin í oljuútreiðslunum.

Umsetningurin hjá Atlantic Airways fyrra hálvár í ár var 250 mió. kr. Fíggjarjavnin hjá felagnum 30. juni 2008 var 484 mió. kr., ið er 95 mió. kr. hægri enn við ársbyrjan. Eginognin var 211 mió. kr. og solvensprosentið 44.



## Vøruhúsið leitar eftir stjóra

**Finnbjørn K. Mouritsen heldur fram sum nevndarlimur, men nevndin er víðkað, og nú skal nýggjur stjóri setast**

VINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á eykaaðalfundi hjá P/F Litaval hin 19. august 2008 varð avgjørt at økja talið av nevndarlimum frá verandi 4 limum upp í 6 nevndarlimir.

- Víðkanin av nevndini er liður í tilgongdini, har fyritøkan fer frá at vera ein familjustýrd fyritøka burturav til at vera ein professionell fyritøka, ið eisini frameftir skal standa seg í kappingini á marknaðinum, sigur høvuðseigarin og fráfarandi nevndarformaðurin, Finnbjørn K. Mouritsen, ið sjálvur annar byrjaði fyritøkuna í 1962.

Eigararnir av fyritøkuni meta at víðari menningin av fyritøkuni krevur, at fokus verður sett á førleikarnar hjá teimum, ið reka fyritøkuna. Tí koma nú tveir persónar úr føroyska vinnulívinum inn í nevndina. Annar er Árni Arge, ið er nýggjur nevndarformaður, og hin er Rógvi Róin.

Fyrsta stigið hjá nýggju nevndini er at seta nýggjan stjóra at stýra virkseminum í samtakinum Vøruhúsið, ið hevur høvuðssæti á Hjalla og deildir í Havn, Saltangará, Klaksvík og Tvøroyri.

- Besti hátturin fram móti at gerast ein professionel fyritøka er, at leiðslan í felagnum eisini kemur uttanifrá, sigur Finnbjørn K. Mouritsen.

Nevndin í P/F Litaval er nú mannað soleiðis: Árni Arge, formaður, Jóannes Mouritsen, næstformaður, Rógvi Róin, Peter Mouritsen, Andreas Mouritsen og Finnbjørn K. Mouritsen.